# Fokus á floksevni

**Tá ið Jóhan í Kollafirði klárar seg betur enn seriøs og skilagóð valevni, sigur tað nógv um støðuna. Øssur Winthereig avdúkaði bæði flokkarnar og miðlarnar sjálvar**

TINGHELLAN - VAL 2004
*Kári á Rógvi*



### Valsendingarnar

Sjónvarp Føroya valdi til hetta valið at skipa valsendingarnar øðrvísi enn higartil. Valevnini úr ymsu valdømunum fingu tvey høvuðsevni at røða um, og síðan stóð ein einsamallur sjónvarpsmaður fyri at spyrja kontantar og skjótar spurningar.

Føroyingar eru vanir við valfundir, har valevnini sleppa at halda stuttar røður eftir egnum tykki. Ógvuliga ymiskt er, hvussu tað liggur fyri hjá fólki at leggja fram. Ein søga er um valevni í Eysturoynni, sum stilla upp fyri Framburðsflokkin á sinni. Kjartan Mohr floksformaður sendi honum eina skrivaða røðu at lesa upp. Hesin so gjørdi, og tá ið hann kom til eitt serliga væl skrivað brot í røðuni, hugdi hann upp og segði: "og hatta haldi eg eisini sjálvur!".

Á valfundum hava valevnini skifst um at hildið røður, skift orð sínámillum og ofta eisini svarað spurningum frá veljarum.

Útvarp og síðani sjónvarp tóku henda siðin upp. Valevnini skrivaðu sær (ella læntu) smáar røður. Floksformenn og aðrir oddafiskar dystaðust ella svaraðu spurningum.

Men, nú var liðugt við tí. Nú skuldu valevnini í øllum valdømunum uppá hálvan annan minutt greiða frá einum evni, sum sjónvarpsmaðurin hevði valt. Síðani vórðu tey forhoyrd við somu góðsku og vælvild, sum tá lektor Blomme hevði ein ringan dag.

### Smæðin og avbrotin

Valevnini vóru tey nógvu illa sperd. Óvon at leggja fram alment, við hvør síni røðu í lummanum, sum Øssur snipst kvetti av.

Liðugt var við orðaskifti millum valevna. Øssur hølvaði tey av. Vallyfti og útsagnir vórðu vend á høvdið og valevnini kravd at standa til svars.

Fyri hvørt evni, sum varð tillutað einstaka valdøminum, slapp ein "vanligur" persónur at greiða frá síni støðu. Hesin persónur slapp í sínum egna umhvørvi við sínum egnu orðum at greiða frá. Afturímóti skuldu valevnini kroystast inn í ein ókendan karm, har tey máttu siga sum mest meðan minutturðið tikkaði, og Øssur ótolin bíðaði.

Mong valevni, enntá verandi politikarar, vinnufólk og fólk kend úr felagsvirksemi, hugdu niður, meðan tey lósu upp eitt ov langt upprit. Tey vóru sera ótrygg, og nógv teirra vóru ikki at kenna aftur.

Spurningarnir fullu sum byrsuskot og valevnini fingu nóg illa orðið upp, fyrr enn tey vórðu avbrotin og spurd uppaftur. Valevnini sluppu ikki at seta dagskránna og sluppu ikki at dystast sínámillum.

### Ein vaskektað gøla

Øssur Winthereig er blaðmannahetja í hesum døgum. Við bókini um at skjóta journalistin hevur hann tala Roma mitt ímót og víst seg sum órædda kempu hjá tí óhefta statsvaldinum.

Í síni tíð var ein kabarett, ið nevndist kreppukabarettin. Tey hermdu eftir Øssuri, sum vant seg upp um hvørt smámál og staðfesti aftur og aftur, at hetta var ein "vaskektað gøøøla".

Fyri mær at síggja var hetta ein gløgg eygleiðing. Heldur enn at upplýsa og og kunna okkum hyggjarar, so leitaði Øssur eftir gølum undir hvørjum steini. Tað ráddi um søguna, vinkulin, ikki høpið, orsøkir og umstøður.

Bókin um at skjóta journalistar hevur somu brek. Hóast nøkur poeng um, hvussu politikarar skylda uppá journalistar og nøkur avdúkandi skjøl, so megnar bókin ikki neyvt at greiða frá, hvat hendi í teim ymsu málunum og seta tað inn í rætta høpið. Tað er ringt at síggja, hvussu "søgurnar" í bókini eru grundaðar á tær nevndu keldurnar; og tað er rættiliga vist, at fólk við akademiskari skúling høvdu aftrað seg við at latið frá sær eitt verk skipað og dokumenterað verk á henda hátt.

### Skilafólk ella Professionel.

Tað er júst høpið – *samanhangurin* - sum manglar í valsendingunum. Valið er ikki bert ímillum flokkar og einstøk valevni. Valið er eisini ímillum hvat slag av politikarum, vit vilja hava.

Skulu umboðini vera skilafólk, álitisfólk, sum hava klárað seg í verki og tikið prógv frá lívsins skúla? Ella vilja vit heldur hava miðlavand, professionel umboð, ið duga at venda sær í einum aðalráði?



*Mynd: Sjónvarp Føroya*

Føroyska siðvenjan er at velja áhugupolitikarar. Ofta kenna veljararnir fleiri av valevnunum persónliga ella av umtalu. Hesi valevni eru kend úr kommupolitikki, áhugafeløgum ella øðrum høpi sum veljarin kennir.

'Konseptið' hjá SVF var til tey professionellu. Óhefti miðilin skal ikki vera ein forlongdur armur hjá lýsingarfyritøkum, journalisturin skal annað enn halda mikrofonini. Valevni, sum eru von at sleppa at hugsa seg um, og politikarar, sum vanliga sleppa at viðgera málini í frið og náðum, skuldu nú ígjøgnum kryvjimaskinuna hjá SVF og uppá staðið fáa roknistykkið at passa.

At velja tvey evni til hvørt valdømi gjørdi eisini, at ringt var at síggja mun á flokkunum. At spyrja um heilsuverk í Norðoyggjum førir sjálvsagt við sær, at øll valevnini markera sín stuðul til Klaksvíkar Sjúkrahús, umframt at tey endaðu inni á so tekniskum evnum akslakirurgi. At spyrja um umhvørvið í Eysturoynni førdi á sama hátt til semju um SEV-útbyggingar.

Sendingin um Suðurstreym hevði onki við Suðurstreym at gera. Mytan tyktist verða váttað um, at veljarin í Havn velur landspolitikarar, meðan tey á bygd velja lokalpolitikarar. Men, høvdu tey spurt valevnini í Suðurstreymi um sjúkraviðgerðin á landssjúkrahúsinum ikki kundi verið flutt til Klaksvíkar, tá tunnilin kemur, ella um Strandferðslan ikki kundi ligið í Suðri, so høvdu tey ivaleyst víst seg líka so lokal sum tey á bygd.

'Fokus á valdømini' vísti seg ikki at vera rætta vøruheitið. Valskipanin byggir á, at tað er bæði rætt og rímiligt at veljarin sleppur at velja sær umboð so nær at sær sjálvum, sum til ber. Tølini vísa enntá, at verandi valdømi eru størri enn veljarin kundi hugsa sær. Í Eysturoynni t.d. fara atkvøðurnar sjálvdan úr bygdarlagnum. Størri valdømini eru, meiri lokalt noyðist veljarin at atkvøða. At fáa nakrar hálvkvaldar viðmerkingar til landsmál, ella staðfest at summi mál eru felags fyri øll uppstillaði í valdøminum, hjálpti neyvan veljaranum at taka støðu.

Tíðindamaðurin vísti seg aftur sum professionellan at seta fram spurningar, men sum amatør at seta fokus á samansett og torfør evni. Veruligt fokus á valdømini hevði borið í sær at kanna nærri støðuna hjá valdømunum demografiskt, vinnuligt og politiskt, og síðan samanbera tað vil valskráir og vallyfti.

Men, lat tað vera sagt. Politikararnir hava ikki játtað kringvørpunum pengar til slíka uppgávu.

### Flokkarnir

Føroyar eins og danska ríkið hava eina stutta demokratiska søgu. Upprunaliga var tað hildið at vera í stríð við stjórnarskipanina at fólksins umboð skipaðu seg í flokkar og bundu seg til annað enn til sína egnu samvitsku og síni egnu vallyfti. Leingi átalaði tingformaðurin á fólkatingi, at røðarar vístu til nakran flokk.

Sjálvt um einstaku flokkarnir í summum tíðarskeiðum og innan summi spurningar, hava havt greiðar støður og politiskar pakkaloysnir, so er tað framvegis millum persónar at veljarin velur.

Hetta samspælið ímillum flokkar og valevni riggar ikki nóg væl. Sendingin hjá SVF er helst ein fráboðan um tíðina, ið kemur. Valevni og flokkar mugu duga at svara spurningum stutt og uppá standandi fót, duga at hyggja inn í rætta kameraið, velja rætta slipsið og tosa miðlamál.

Stóri feilurin hjá flokkunum er, at teir ikki finna sær valevni í nóg góðari tíð og skúla og fyrireika tey. Øðrumegin mugu tey tryggja sær kunnleika til politisk og samfelagslig evni og viðkomadi førleikar at vera við í tingarbeiði. Hinumegin mugu tey læra seg at klára seg í smørtum, stuttmintum miðlum.

Snøgt sagt mugu skilafólk, eins og ítróttafólk seinastu árini, gerast halvprofessionell. Flokkarnir mugu fáa fleiri pengar at arbeiða við og mugu útbúgva skilafólk at klára seg í politisku fyrstu deild.

### Sjónvarp Føroya Fólks

Flokkar og valevni vóru ikki fyrireikaði uppá hesa mylnuna, og SVF kundi sum skattafíggjaður miðul havt sæð tað sum part av síni public service uppgávu at verið við í politisku førleikamenningini og kunnað eitt sindur betur um konsept og teknikk. Men, partur av trupulleikanum er sjálvsagt, at løgtingið hvørki vil játta nóg mikið til kringvørpini ella flokkarnar.

Meðan bæði flokkar, valevni og miðlar eftir Fokussendingarnar tykjast sum amatørar, veksur bara valdið hjá lobbyistum, nørdum og embætisverki.



# Skot frá mjødnini

**Lærarin og virkisráðgevin, Bergur Godtfred, kallar stílin hjá Øssuri Winthereig og Sjónvarp Føroya fyri revolvarajournalistik. Um rákið heldur áfram, missa vit innihaldið, og fokus verður sett á formin, heldur hann. Um hetta er ein skeiv gongd ella ikki, vil hann tó ikki siga nakað um, men hann leggur dent á, fjølmiðlarnir mugu gera sær sín leiklut greiðan**

VALSENDING
*Kristian E. Andersen*
*kristian@sosialurin.fo*



*Bergur Godtfred, lærari og virkisrágevi, sigur, at fjølmiðlarnir mugu gera sær sín leiklut greiðan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Tað snýr seg um at skjóta skjótt frá mjødnini. Tískil kallast hatta revolvarajournalistikkur, sigur Bergur Godtfred, lærari og virkisráðgevi, um nógv umrødda stílin hjá Sjónvarp Føroya og Øssur Winthereig í valsendingunum herfyri.

Bergur Godtfred greiðir nærri frá hesum og sigur, at mann í sendingunum vil hava eitt ávíst svar uppá ein ávísan spurning, og tað gevur uppaftur minni pláss fyri argumentum. Meira verður hugt eftir, hvussu valevnini klára seg í formidlingini, og um tey klára at standa ímóti tí trýsti, sum er, tá mann ferðast í einum miðli, mann ikki er vanur við.

Bergur Godtfred heldur, at hatta rákið ikki er so modernað longur í grannalondum okkara.

– Hatta var modernað í londunum rundan um okkum fyri nøkrum árum síðan. Men har er mann farin eitt sindur frá tí aftur. Í Føroyum tekur tað dik á seg nú, sigur Bergur Godtfred

### Sín leiklut greiðan

Bergur Godtfred er samdur við teimum, sum halda, at nógv nýggj valevni hava havt trupulleikar við revolvarastílinum.

– Rættiliga nógv hava klárað seg rættiliga illa. Hinvegin hevur Øssur ikki hjálpt teimum. Spurningurin er so, um tað er uppgáva hansara, greiðir ráðgevin frá.

Bergur Godtfred vil ikki siga nakað um, revolvarjournalistikkurin er ein skeiv gongd ella ikki, men hetta við at definera uppgávur, heldur hann vera avgerandi. Hann heldur, at Sjónvarp Føroya má gera sær sín leiklut greiðan, serliga nú tað er valstríð, um tað vil vera miðilin, sum formidlar ein boðskap uttan at ávirka hyggjaran, ella um tað vil vera ein miðil, sum ávirkar hyggjaran.

– Um hatta er ein skeiv gongd, veit eg ikki. Tað veldst um, hvat tað er, sum mann vil. Miðilin má gera sær greitt, hvør uppgáva hansara er. Vil hann ávirka ella vil hann ikki ávirka. Og so má hann fortelja teimum, sum koma í sjónvarpið, hvat tað er, hann vil. Trupulleikin er, at partarnir ikki vita, hvørji krøv og væntanir, teir seta hvørjum øðrum. Tá tað er greitt, kunnu teir møtast í einum felags formi og sleppa undan at fara skeivir av hvørjum øðrum, vísir Bergur Godtfred á.

Virkisráðgevin vil vera við, at tá valevnini og politikkarnir er vorðin tilvitað um hesi krøv og hesar væntanir, sum miðilin setir teimum, eigur tað at vera gjørligt hjá teimum at fara út og leita sær vitan og ráðgeving, um hvussu tey betur kunnu føra seg fram í fjølmiðlunum, nú tað ikki snýr seg so nógv um argumentir longur.

### Ráð til flokkarnar

Um rákið heldur áfram, verður fokus sett á formin, og vit missa innihaldið. Hetta sæst longu í valsendingunum, sum hava verið, heldur Bergur Godtfred

– Hóast nógv klára seg illa, hava summi klárað seg væl, og tað er týðiligt at hetta eru fólk, sum eru von við formin sum t.d. fjølmiðlafólk, sigur Bergur Godtfred.

Framyvir vera teir ymisku flokkarnir noyddir at fáa sær eina fjølmiðlaætlan til vega, um teir vilja klára seg í hesum rákinum.

– Fyrst og fremst mugu flokkarnir ásanna, at øll eru ikki líka góð til alt. Summi hava servitan innan eitt, og onnur hava servitan innan okkurt annað. Tí muga flokkarnir gera sær eina fjølmiðlaætlan og velja fólk út, ið hava servitan innan hetta økið. Flokkarnir kunnu so taka fjølmiðlafólki út til júst ta uppgávu at taka sær av fjølmiðlunum undir valstríðnum, sigur Bergur Godtfred, sum millum annað hevur undirvíst í samskiftis- og lýsingarsálarfrøði, at enda.

# Ósamdir floksskrivarar

**Politisku floksskrivararnir hava ymiskar uppfatanir av stílinum hjá Øssuri Winthereig og framførslunum hjá umboðum teirra í valsendingunum hjá Sjónvarp Føroya herfyri**

VALSENDING
*Kristian E. Andsersen*
*kristian@sosialurin.fo*

Uppfatanirnar hjá teimum ymisku floksskrivarunum eru ymiskar, tá tað snýr seg um nógv umrødda stílin hjá Øssuri Winthereig og framførsluna hjá umboðum teirra í valsendingunum hjá Sjónvarp Føroya herfyri. Onkur heldur, at Øssur Winthereig als ikki fór illa við teirra nýggju, óroyndu valevnum. Onkur heldur, at tað ikki kann vera meiningin, at summi umboð vóru bebbarædd í sjónvarpinum. Og onkur heldur, at teirra umboð kláraðu seg fínt og vóru væl fyrireika.

### Lagaligur vertur

Svein Askildsen, floksskrivari Miðfloksins, er ikki samdur við teimum, sum siga, at Øssur Winthereig fór illa við teimum nýggju, óroyndu valevnunum.

– Sjónvarpsverturin var lagaligur móti teimum nýggju, óroyndu valevnunum. Hann gav teimum ein møguleika. Tað er rætt, at hann var harður móti summum, men tað snúði seg meira um tey royndu, garvaðu valevnini. Og tað er í lagi. Tað eiga tey at tola, leggur Svein Askildsen afturat.

### Dámdu ikki stílin

Floksskrivari Tjóðveldisfloksins, Áki Andreasen, er ein teirra, sum heldur, at Øssur Winthereig var alt ov harður við valevnini.

– Hatta var ein sjáldsamur stílur. Vit eru ikki glaðir fyri hann. Tað gekk ov skjótt. Fólk fingu ikki møguleika at svara. Vit vóru ovfarnir. Vit høvdu ikki væntað, at fólk fóru at vera bebbarædd á skíggjanum. Tað kann ikki vera meiningin, sigur Áki Andreasen.

Áki Andreasen heldur annars, at hatta er rák, sum mann ikki kann seta seg ordiliga upp ímóti. Sjónvarp Føroya roynir at gera tað so undirhaldandi og áhugavert sum gjørligt, og tað skulu teir eisini hava loyvi til, men onkuntíð má mann tala at eisini.

– Sjónvarp Føroya má hava loyvi til at gera tað so undirhaldandi og áhugavert sum gjørligt. Fólk mugu jú ikki gerast troytt av politikki og politikkarum, men hinvegin er neyðugt at tala at, tá tað fer út á eitt síðuspor, sum tað gjørdi í hesum føri, greiðir Áki Andreasen frá.

### Fín framførsla

Steintór Jacobsen, ein av tveimum floksskrivarum Fólkafloksins, skilir ikki ordiliga tosið um, at valevnini kláraðu seg illa. Í hvussu so er ikki, tá tað snýr seg um Fólkafloksins umboð.

– Okkara umboð kláraðu seg heilt væl. Tey vóru væl fyrireikað, og svaraðu kontant og konkret uppá spurningarnar. Meira er ikki at siga um hasar sendingarnar, sigur hann við Sosialin.

### Valevni klár

Uttan at seta nøvn á, skilir floksskrivari Sambandsfloksins, Helgi Abrahamsen, væl trupulleikan í, at summar framførslur ikki vóru av teimum bestu. Hann sigur, at orsøkirnar liggja í, at konseptið í sendingunum var bygt rundan um tey einstøku valdømini, og at valið bleiv útskrivað í úrtíð, og tískil var tíðin til at fyrireika vallistan knøpp.

– Konseptið í sendingini snúði seg millum annað um lokalpolitik. Í summum valdømum sleppa einans fýra fólk á vallistan, og av teimum skulu tvey í sjónvarpið. Tá er tað trupult at finna tvey, sum eru von við og duga at føra seg fram í hesum miðli. Vit kundu sjálvandi havt fyrireikað tey til tað, men tíðin var so sera knøpp, vísir Helgi Abrahamsen á.

Spurdur um, hví flokkarnir ikki hava valevni klár, hóast val ikki er, soleiðis at flokkarnir sleppa undan at fara at leita eftir valevnum, hvørja ferð val verða útskrivað í úrtíð, sigur hann, at tað hevur hann hugsað um, og tað er nakað tey í flokkinum áttu at arbeitt við framyvir.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á floksskrivara Javnaðarfloksins og Sjálvsstýrisfloksins, áðrenn blaðið fór til prentingar.